Álit

í

løgtingsmáli nr. 18/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutning (Hægri avgjøld á tubbak og snús – fylgilógaruppskot til FLU 2026)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 30. september 2025, og eftir 1. viðgerð 21. oktober 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. oktober, 6. og 21. november, og 10. desember 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Krabbameinsfelagið, Handilsvinnufelagið, Búskaparráðið, undanfarnu landsstýriskvinnu í heilsumálum, Súsonnu Bertholdsen, saman við Heilsustýrinum, og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Dennis Holm, Hanna Jensen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at hækka avgjaldið á tubbak og snús.

Nógv – eisini ung fólk – snúsa. Gransking vísir, at støðugt fleiri heilsuskaðar, undir hesum varandi heilsuskaðar, kunnu standast av at snúsa.

Kanningar vísa, at tað ber til at røkka munadyggum úrslitum, um fleiri amboð verða nýtt samstundis. Virknastu amboðini, tá tað snýr seg um at ávirka nýtslu og forða fyri heilsuskaðiligari ovurnýtslu í einum samfelagi, eru atkoma og prísir.

Í Krabbameinsætlanini fyri Føroyar (2022, tilmæli nr. 7) verður mælt til, at "prísurin á tubbaksvørum støðugt verður hækkaður."

Um prísurin á tubbaksvørum og nikotinvørum hækkar munandi, ber millum annað til:

- at forða fyri, at børn og ung byrja at brúka hesar vørur, og harvið røkka málinum um, at børn, sum eru fødd í 2015 ella seinni, verða tubbaksfrí og nikotinfrí,
- at tálma tubbaksnýtslu og nikotinnýtslu sum heild,
- at minka um sosiala ójavnan í heilsustøðu hjá fólki.

Seinnu árini eru tiltøk sett í verk, sum hava til endamáls at minka um royking, men eingi tiltøk eru sett í verk til tess at minka um snúsnýtslu.

Undir viðgerðini er komið fram, at lutfalsliga fleiri roykja í Føroyum samanborið við hini Norðurlondini. Tubbak er ein av størstu orsøkunum til, at fólk fáa krabba, og deyðiligheitin er høg.

Alt fleiri ung snúsa heldur enn at roykja. Tølini, ið eru til taks, eru frá 18 ára aldri, men nógv fleiri ung, heilt niður í 12 ára aldur, snúsa.

Tilmælini frá Krabbameinsfelagnum eru at hækka prísirnar meira enn í fyriliggjandi uppskoti; ein sigarettpakki átti at kostað meir enn 100 kr. Tað eiga eisini at verða avmarkingar av, hvar og nær á døgninum tað er møguligt at keypa tubbak og snús, og vit eiga at hava fleiri roykfrí øki, eisini uttandura.

Handilsvinnufelagið hevur víst á, at gildiskomuásetingin fer at raka innflytararnar hart fíggjarliga. Tað er long leveringstíð uppá sigarettir og snús, og tí hevði ikki borið til at hamstra, sjálvt um gildiskoman var sett, til dømis, frá, tá ið lógin er samtykt. Tey hava eisini víst á, at hækkingarnar á snús eru ógvusligar í einum, hóast tey eru samd um, at nýtslan eigur at tálmast.

Fleiri hoyringarpartar hava víst á, at ein hækking sum henda í prísunum á hesum vørum kann viðføra, at sølan í Duty Free fer at hækka ógvusliga, og tí eigur hetta ikki at standa einsamalt. Víst hevur eisini verið á, at ávísar tubbaksvørur eru bíligari í Duty Free í Vágum enn í Kastrup.

Ymiskt er í Norðurlondum, hvussu avgjald verður lagt á hesar vørur. Noreg hevur líknandi avgjald, sum her verður skotið upp. Í Danmark og Svøríki er avgjaldið eftir nikotininnihaldi og ein prosentpartur av søluprísinum.

Búskaparráðið hevur víst á, at ein hækking av prísinum er eitt effektivt amboð mótvegis teimum ungu, tí nýtslan verður ávirkað av inntøku.

Heilsustýrið hevur víst á, at tað hevði verið rætt at ásett eitt hámark fyri nikotin innihald í snúsposunum. Í Danmark hevur verið arbeitt við at seta hámark á 9 mg pr. posa. Meirilutin tekur undir við sjónarmiðinum hjá Heilsustýrinum.

Heilsustýrið er við at menna eina app, ið kemur í januar 2026, sum skal hjálpa fólki at leggja av at brúka snús og tubbak.

Heilsustýrið mælti til at hækka prísirnar nú og at seta eina javningarskipan inn, so prísirnir hækka støðugt. Hesum sjónarmiði tekur meirilutin eisini undir við.

Undir viðgerðini er komið fram, at prísurin á Prima snúsi, ótilætlað, er vorðin lutfalsliga høgur í mun til hækkingarnar annars. Fyri at rætta uppá hetta, hevur landsstýriskvinnan síðani lagt fram annað lógaruppskot (lm. 55/2025), har Prima snús fær sítt egna vørunummar í toll- og vøruskránni. Tað uppskotið fær virknað frá framløgudegnum, 2. desember 2025.

Undir hoyringunum er eisini komið fram, at gildiskomuásetingin í hesum uppskotinum skapar trupulleikar fyri tey, ið innflyta og selja tubbak og snús. Meirilutin metir, at rættast er tí at broyta gildiskomuásetingina, soleiðis at broytingarlógin fær virknað frá 2. desember 2025, t.e. samstundis sum hitt uppskotið (lm. 55/2025).

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 2 verður orðað soleiðis:

"**2.** Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2402.20.10 til 2402.90.00 í 3. teigi broytt frá "100 stk. 145,00 kr." til: "100 stk. 180,00 kr."

2. § 1, nr. 4 verður orðað soleiðis:

"**4.** Í kapitli 24 í frumskjali 1 í skjali 1 verður punktavgjaldið á vørunumrunum 2403.99.20 til 2403.99.90 í 3. teigi broytt frá "144,00 kr. pr. kg." til: "2.000,00 kr. pr. kg.", tó so, at punktavgjaldið á vørunummarið 2403.99.35 verður ásett til "800,00 kr. pr. kg."

3. § 2 verður orðað soleiðis:

"§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 2. desembur 2025."

Viðmerkingar
Undir nevndarviðgerðini hevur tað víst seg, at broytingarnar í uppskotinum hava sera stóra ávirkan á leyst snús, ið vanliga verður brúkt í Føroyum (Prima snús). Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum hevur tí mælt nevndini til at gera eina broyting í lógaruppskotinum.

Fyri at kunna taka nakað av avgjaldshækkingini av hesum snúsinum uttan at ávirka annað snús er neyðugt at nágreina vøruna. Hetta verður gjørt í Tolllógini við lm. 55/2025, sum er lagt fram, meðan hetta uppskotið hevur verið til viðgerðar í Fíggjarnevndini, har ein undirbólkur 2403.99.35 verður settur inn fyri "Snus med indhold af tobak".

TAKS hevur upplýst, at innfluttir vórðu 12.000 pakkar av primasnúsi á 100 gr. í 2024. Broytingaruppskotið lækkar avgjaldið fyri hetta úr 2.000 kr. til 800 kr. pr. kg. Fyri at fíggja hesa lækking verður avgjaldið á sigarettir hækkað við 5 oyrum afturat.

Samlaðu fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum verða sostatt á leið tær somu.

Lm. 55/2024 hevur virknað frá framløgudegnum, sum var 2. desember 2025. Uppskotini bæði mugu hava virknað frá sama degi, og tí verður gildiskoman í hesum uppskotinum broytt frá at hava virknað frá framløgudegnum til at hava virknað frá 2. desembur 2025.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen og Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Hetta lógaruppskotið hevur til endamáls at hækka avgjaldið á snúsi og tubbaki og er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2026.

Greitt verður frá, at landskassin hevur í dag eina inntøku á umleið 45 mió. kr. í punktgjøldum frá snúsi og tubbaki, og at verður ætlaða hækkingin samtykt, so økist inntøkan við 20 mió. kr. við teirri fortreyt, at nýtslan lækkar 10% fyrsta árið. Við øðrum orðum, so verður mett, at landskassin fer at fáa uml. 65 mió. kr. í punktgjøldum fyri snús og tubbak í 2026.

Sum nevnt omanfyri, so er hetta eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógina. Endamálið við uppskotinum er tí at fáa fleiri pengar í landskassan fyri at fíggja nøkur av teimum átøkunum, samgongan hevur sett sær fyri at seta í verk í 2026. Hetta er tí eitt reint avgjaldsuppskot.

At snúsa og roykja er ikki gott fyri heilsuna, nei tað er skaðiligt, og so er bundinskapur knýttur at hesum eisini. Átøk eiga tí at gerast fyri, at fólk als ikki byrja at snúsa og/ella roykja og eisini at fáa tey, sum eru byrjað, at gevast. Hetta er ikki so einfalt, men átøk eiga at gerast.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður m.a. skrivað, at kanningar vísa, at tað ber til at røkka munadyggum úrslitum, um fleiri amboð verða nýtt samstundis. Eisini verður skrivað, at virknastu amboðini hesum viðvíkjandi eru atkoma og prísir.

Í hesum uppskotinum verður bert fokuserað uppá prísin og ikki uppá atkomu. Heldur ikki verður eitt orð nevnt um tey, sum eru bundin av nikotini – hvussu tey kunnu fáa hjálp.

Minnilutin heldur, at hetta við at snúsa og at roykja er eitt álvarsmál, men heldur ikki, at hetta uppskotið fer at bøta nevnivert um teir trupulleikar, sum snúsing og royking elva til. Stutt sagt, so fær landskassin nakrar mió. kr. eyka, og tað er tað.

Minnilutin heldur, at um átøk veruliga skulu muna, tá tað snýr seg um at ávirka nýtslu og forða heilsuskaðiligari ovurnýtslu, so er als ikki nóg mikið at hækka prísin nakað. Her eigur heldur at leggjast ein ítøkilig ætlan – saman við heilsumyndugleikanum –fyri, hvussu røkkast kann endamálinum, sum má vera at gera alt fyri, at eingin byrjar at snúsa og roykja, og so eisini at fáa fólk at leggja av við hesum. So atkoma, prísur og boð uppá loysn frá bundinskapi eiga natúrliga at gerast partur av hesi ætlan, nokk saman við øðrum átøkum, sum heilsumyndugleikin hevur boð uppá.

Undir hoyringunum hevur verið víst á, at rættast hevði verið, at avgjaldið hevði verið lagt eftir nikotininnihaldi, heldur enn eftir sjálvari nøgdini. Nøgdin sigur sum so ikki nakað um, hvussu ósunt snúsið ella sigarettin er, men tað sigur nikotininnihaldið okkum. Tílík skipan verður brúkt í grannalondunum, og er minnilutin av teirri sannføring, at man heldur eigur at brúka tílíka skipan.

Samanumtikið heldur minnilutin, at tað, sum hetta uppskotið fer at føra til, um tað verður samtykt, er, at landskassin fær nakrar mió. kr., meðan trupulleikarnir við snúsing og royking so at siga verða óbroyttir.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 12. desember 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	